## VIÐMERKINGAR

# Framtíð Føroya!

**Júlian Jón Thomsen**
*Valevni Folkafloksins í Sandoynni*

Tað verður oftað tosað aftur og fram um framtíð Føroya. Ja hvat er so framtíð Føroya? Tað er kanska ein spurningur vit skuldu spurt okkum sjálvi, tí tað er sera umráðandi at vit eru greið ivir hvat framtíð Føroya er. Onkur vil kanska verða við at tað er oljan, sum sigst skal verða í undirgrundini og uppaftur onnur at tað er fullveldið sum er framtíð Føroya.

Eg skal ikki siga hvat er rætt ella skeivt, men tá eg havi hugsa spurningin í gjøgnum eri eg ikki í iva hvat eg haldi framtíð Føroya er. At síggja foreldur koma við barnavogni, síggja dreingir og gentir renna eftur einum bóltið og tá longur er komi fram í árini so at síggja tey aftur renna , men hesu ferð eftur hvørjum øðrum. Tað er tað eg kalli fyri framtíð Føroya.

Fyri at tryggja okkara framtíð má og skulu umstøðurnar verða í lagið. Barnaskúlarnir í sandoynni, serliga á Sandi og Skopun eru alt ov smáir. Í sumum førum eru skúlarnir als ikki í tráð við tað tíð vit livað í.

At framtíð okkara skal nærum sita oman á hvørjum øðrum í skúlastovunum er ikki nakað vit kunnu bjóða næmingum ella lærarum teirra. Umstøðurnar mugu verða so at børnini, foreldrini og lærararnir føla, at skúlarnir hava tær umstøður har øll kunnu føla seg trygg.

Nógvar kommunur stríðast við skuld í dag, summar meira enn aðrar. Í Sandoynni kenna vit væl til at tær størru kommunurnar eru skulda tyngdar og tí ikki eru so væl førar fyri at fáa gjørt umstøðurnar virðiligar fyri børn okkara.

Landi má uppá ein ella annan máta kunna finna eina loysn saman við teimum kommunum sum hava skúlar, sum als ikki eri tíðarhóðskandi, hvørki í stødd ella umstøðum.

Tá farið verður at byggja er tað umráðandi at grundin er so sterk at hon kann bera tað, sum verður bygt omaná. Størsta og besta íløgan land og kommunur kunnu gera er, at børn og ungdómur okkara hevur teir bestu karmar at læra og vaksa upp í so teirra barlast út í lívið er so góð sum gjørlig.

Tá ungdómurin er liðugur í framhaldsdeildini fara tey flestu av oynni at arbeiða ella lesa víðari. Tað syrgiliga av øllum hesum er, at tey fægstu koma aftur. So kunnu vit spyrja hví so er? Tilboðini aðrastaðni frá eru so nógv, at ringt er at taka frástøðu frá tí. Tað má kunna arbeiðast fyri at ungdómurin kann støðast og trívast í Sandoynni.

So endar alt har eg byrjaði. Hvat er framtíð Føroya? Fyri at føra Sandoynna víðari inn í framtíðina so skulu børn og ungdómur fáa tær umstøður, íð eru virðiligar. Annars kunnu vit gloyma alt um tað eg kalli framtíð Føroya.

Tað er hugaligt at síggja at javnaðarmaðurin og bygdamaðurin vísur áhuga fyri okkara hugsan um, hvussu vit í fólkaflokkinum kundu hugsað okkum at gjørt umstøðurnar hjá okkara børnum og ungdómi tær bestu. Eg gangi tí út frá, at vit ikki eru so ósamdir tá tað kemur til barnaskúlarnar og vónandi kundi vit arbeitt saman um ungdómin eisini.

Fólkaflokkurin vil arbeiða fyri at fáa umstøðurnar hjá framtíð Føroya tær bestu so okkara børn og ungdómur kunnu verða líka stilla ikki bara í Føroyum men í øllum norðanlondum og londum úti í heim, sum vit meta okkum við.

# Økisfriðingar skapa økismenning

**Heini O. Heinesen**
*løgtingsmaður framsøgumaður í vinnumálum*



Tað sum skapar eitt sterkt samfelag við sterkum búskapi, er eitt fólk (ein tjóð) sum hevur visjónir. Hetta er tað sum skapar eitt sterkt vinnulív. Úrslitið av hesum verður ein sterkur búskapur.

Tað sum ein kann undrast á er, at okkara høvuðsvinnur hava verið so lítið frammi í orðaskiftinum upp til hetta valið.

Tað sær út til, tað heldur er soleiðis, at valevnini sum bjóða seg fram, hava hug til at taka sær rós av tí sum komið er á skaftið.

Tað at tað er góður fiskiskapur og serliga góður prísir á okkara fiskavørum er ikki nakað, sum ting- og landsstýrimenn kunnu takað sær heiðurin av. Tað verður ongantíð soleiðis, at alt er so ljósareytt, tí at ávísir persónar koma at sita í landsins stjórn.

Vit høvdu eina landsumfatandi kreppu fyri 10 árum síðani. Hetta kom serliga av at polittikkarar og vinnulívsmenn, í stórum tali ikki høvdu verið nóg dugnaligir at stýrt okkara høvuðsvinnu, sum tí livdi av studningi. Hjá teimum flestu av omanfyri nevndu var stovnrøktarpolitikkur eitt stað á mánanum.

Tá so natúran eisini segði til, við vánaligum fiskiskapi, serliga tí, vit høvdu ovurfiskað okkara fiskastovnar, við studningi úr landskassanum, tá fingu føroyskir politikkarir og vinnulívsmenn annað latín at lesa.

Tað at politikkarnir gjørdust meira bevístir um stovnsrøktarpolittikk, og studningurin og veðhaldini vórðu avtikin, hevur gjørt, at flotin er vorðin betri hóskandi til at fiska tað, sum ráðligt er at takað úr fiskastovninum á føroyagrunninum.

Kunngerðin um tær lógarfestu heilársfriðingarnar, sum komu í gildi 6. januar 1994, hevur eisini prógva, at tað loysir seg at føra ein skilagóðan stovnsrøktarpolitikk. Herafturat eru vit vælsignaðir við góðum natúrviðurskiftum seinastu árini.

Hesar friðingar vóru úrslitið av løgtingsmál nr. 149/93 "fýra trolfrí øki á landleiðini" framlagt av undirritaða á Løgtingi 24.mars 1993, samtykt 10. mai sama ár.

Kunngerðin var sett inn í lógina "um vinnuligan fiskiskap" eftir uppskoti frá sama, løgtingsmál nr. 108. Staðfest og kunngjørd 20. mai 1996 sum partur hesu lóg.

**Eitt standandi stríð:**
Tað hevur mangan verið hart at vart hesar friðingar í løgtinginum. Sum dømi kann eg nevna, at tað var ikki eitt ár farið eftir at friðingarnar vóru komnar inn í lógina, til uppskot kom frá landsstýrismanninum í fiskivinnummálum, um at takað tær úr lógini. Tað vil siga, um uppskotið var samtykt kundi landsstýrismaðurin broytt friðingarnar, ella um hann vildi tað, avtakað tær, uttan at spyrja løgtingið eftir.

Sum norðingur kann eg minnast, árenn eg kom inní politikk, hvussu Klaksvíkar útróðrarfelag stríddist fyri at faa leiðirnar norðanfyri friðaðar fyri trolið.

Sum fráleið vóru tað eisini onnur útróðrarfeløg, saman við okkara skilabestu útróðarformonnum, sum ávaraðu ímóti tí stóra veiðutrýstinum, sum í flestu førum var fíggjað við studningi úr landskassanum.

Landsumfatandi fiskiveiðufeløg, sum vóru við tá kunngerðin skuldi góðkennast av vinnuni vóru:

Meginfelag útróðrarmanna, Felagið Snelluskip, felagið Línuskip, felagið Ídnaðarskip, og felagið Trolskip.

Eg kann minnast tá fiskivinnunevndin, sum eg tá var formaður í, saman við landsstýrismanninum, hevði gjørt semju um hvussu friðingarleiðirnar skuldi verða. (Tað vil siga ein meiriluti í fiskivinnunevndini og ein meiriluti í landsstýrinum.) Hetta var til jólar 1993. Tá lovaðu tvey av feløgunum, at kom kunngerðin í gildi, so løgdu teir flotan. Feløgini fingu tá 8 dagar til finna eina semju. Semjan var undirskrivað 4. januar 1994 Veikleikin við hesu semju varð, at E kassin eystanfyri gjørdist opin. Frá 1. feb. til 30. mars vegna upsaveiðuna við troli og sunnari kantur broyttir 3 fjóringar longur norður vestur til Oyragrynnuna vegna trolídnaðarveiðuna. Henda broyting er mótvegis Skeiva Banka (pgt. 6)

Henda broyting var sera óheppin fyri upsaveiðuna sum heild, tí kassin kom at verða opin í gítingartíðini hjá upsanum. Tað at flyta sunnara markið á kassanum longur norður frá Oyragrynnuni eystureftir, var eisini ein óheppin broyting. Tað er henda leiðin sum ofta er stongd tí at fiskurin er so smáttfallandi. Skiparin á einum partrolara ringir til mín á hvørjum og sigur at hetta er tann reini ørskapur, at vit faa loyvi at fara inn í E kassan í gítingartíðini hjá upsanum. Holið, sum liggur í E kassanum, er gott nokk friðað alt árið, men hetta øki er so lítið, at tað er møguligt at trola tværtur yvir, um einki verjuskip er á staðnum.

Vilt tú tryggja eina framhaldandi skilagóða stovnsrøkt á Føroyagrunninum, so velur tú Tjóðveldisflokkin tann 30. april, ti flokkurin er trygdin fyri framhaldandi framburði i Føroyum.

# Við Fólkaflokkinum til sjálvberandi búskap

**Ragnar S. Olsen**
*Valevni hjá Fólkaflokkinum í Eysturoy*



Fyri at vit kunnu hava ein sunnan búskap her á landi, er neyðugt við stabilum búskaparkarmum fyri bæði vinnuna og hin einstaka.

Tað er eisini neyðugt hjá bæði vinnu og tí einstaka at vita, at tað altíð skal loysa seg at vinna pening.

Tá vilja allir partar hava mest eftir. Eisini landskassin.

Hetta vil m.a. hava við sær:

- vilja hava meira eftir – Eisini landskassin
- Menningarhugurin stimbrast
- Arbeiðshugurin økist
- Fólkið trívist betur

Fólkaflokkurin hevur sum hjartamál at náa omanfyrinevnda máli.

Eingin skal ivast í, at tað er Fólkaflokkurin, ið best er førur fyri at fremja hetta í verki.

# Tey, ið vilja leiga út, skulu sleppa undan skatti

**Fríðálvur Jensen**
*valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymi*



Tað er sera harmiligt at uppskotið, um at veita skattafría inntøku av leiguni, ikki varð samtykt.

Skulu vit hjálpa uppá ein part av bústaðartrupulleikanum, mugu vit beinanvegin leggja lógaruppskot fyri tingið um at veita teimum, sum vilja leiga kjallara o.a. út, SKATTAFRÍA INNTØKU AV LEIGUINNTØKUNI.

Sum eg havi nevnt, eru vit í eini heldur akuttari støðu, tí tað ikki er nóg mikið av bústøðum til tey, sum ynskja at festa búgv.

Við at fara undir eitt slíkt tiltak, hevði tað ivaleyst havt við sær, at leiguinntøkan hevði komið niður á eitt støði, sum gjørdi tað møguligt hjá ungum og eldri at fáa húsarhaldið at hanga saman.

www.samband.fo



## VALGREINAR

# »Fara at ganga saman«

**Eli Christiansen**
*valevni Fólkafloksins í Suðurstreymoy*



Heðin Mortensen hevur grein í Sosialinum 4. apríl. Hann sigur, at ein komandi samgonga millum Sambandsflokkin og Javnaðarflokkin "fer fyrst og fremst at skipa ein felags politik á búskapar-, fíggjar, skatta- og vinnuøkjunum". Uppgávurnar hjá hesi samgongu "verða fyrst og fremst at fáa skil á aftur almennu prioriteringina." Og so kemur hann inn á forsømd mál. Tað stuttligasta er, at hann sigur, at Javnaðarflokkurin hevur "størri fatan av, at tað er marknaðarbúskapurin, sum dregur vognin…" (he-he), og at Sambandsflokkurin hevur "betri fatan av, hvønn týdning almennar tænastur hava fyri trivnaðin og fyri búskapin."

Havi lisið aðrar greinir hjá Heðini og hjá fleiri øðrum sambands- og javnaðarfólkum. Felagsnevnarin fyri hesar er, at hesi fólk eru negativ um alt, sum er hent og gjørt, og hesi fólk lova gull og grønar skógvir, bara tey sleppa framat. Tað tykist sum, at tey skulu bara spilla alt út, bara tí tey ikki hava verið við í framgongdini, sum hevur verið síðstu árini.

Hesi fólk siga m.a., at onki er hent ella gjørt síðstu árini. Tað verður sagt annars sagt, at um tú endurtekur eina lygn nóg ofta, so fara fólk at trúgva henni. Kann vera, at hesi fólk vilja royna, um hetta passar.

Veruleikin er so tann, at tað er hent og gjørt sera nógv hetta valskeiðið, hóast stórar upphæddir eru lagdar til síðis at nýta seinni og at standa ímóti við. Eg trúgvi, at um nøkur ár fara vit at minnast hetta valskeiðið sum eitt vendipunkt í føroyskari søgu á fleiri økjum. Sjálvandi liggur okkurt á láni, men nógv av hesum málum hava gjørt tað í nógv Harrans ár. Tí er ikki "snakka" meira um hetta, men seta okkum saman og finna hóskandi loysnir á hesum málum eisini.

Av málum, sum eru loyst ella fingin uppá pláss í hesum valskeiðið, kunnu nevnast fleiri av teim stóru:

bankamálið
skuldarspurningurin við donsku stjórnina
marknaðartrætan við bretar
betri handilsavtala við ES
hægri pensjónir og stuðul til lesandi
skattalættar til privat persónar
partafelagsskatturin niður á 20%
Brimil
Teistin
útbyggingin á Landssjúkrahúsið byrjað
undirsjóartunnil til Vágar skjótt liðugur
arbeiðið uppá Gásadalstunnilin byrjað
fyrireikingar uppá undirsjóartunnil til Norðoyggjar
Suðuroyarskip verður bygt skjótt
fyrireikingar til oljuvinnuna

Og eg kundi hildið á, men poengið er, at nógv er fingið av skafti, umframt at vit hava sett ríkisrættarligu viðurskiftini í perspektiv. Nógv álit eru eisini skrivað um t.d. vinnulig, útbúgvingarlig, sosial og onnur viðurskifti. Hesi geva okkum gott innlit og eru gott grundarlag at byggja á, tá vit skulu finna loysnir á hesum økjum.

Hvat kunnu hinir gera so nógv betur?

Well, Javnaðarflokkurin ætlar sær at brúka 100-tals miljónir. Teir ætla sær at hækka arbeiðsmarknaðargjøldini og at brúka pengarnar, sum eru spardir upp. Einaferð í 80'unum tosaðu teir um 500 dagar. Nú veit eg ikki, um teir ætla sær at brúka allar pengarnar uppá 500 dagar hesuferð. Livst so spyrst.

Veit satt at siga ikki, hvat Sambandsflokkurin ætlar sær. Men eg kann so ikki gloyma, hvør var løgmaður valskeiðið beint undan hesum, og hvussu hesin og flokkur hansara spældu hazard við hóttanum aðruhvørja løtu við at skriva út val. Tað var sjálvandi Edmund og Sambandsflokkurin. Teir eru bara kendir fyri at siga nei, og at onki ber til í Føroyum. Teir hava eitt so religiøst forhold til Danmark, at teir líta meira á danir enn á seg sjálvar. Teir formáa sær einki sjálvir hvørki innanfyri ella uttanfyri danska ríkið. Man fær kensluna av, at tað besta hevði verið, um einasta inntøkan hjá okkum var blokkurin.

Vón mín er tí, at Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin ikki sleppa at ráða fyri borgum einsamallir til skaða fyri allan framburð. Harafturímóti er alneyðugt, at útbyggingar og verandi arbeiði halda fram, umframt at vit finna loysnir á "forsømdum" økjum sum eldraøkinum v.m. skjótast møguligt. Saman við hesum hongur, at tað er ómetaliga neyðugt at menna verandi og nýggjar vinnur, so vit eiga pengar at reka samfelagið forsvarligt fyri.

# Virðiligar umstøður í Hoydølum eru alneyðugar

**Bartal Nolsøe Poulsen**
*Valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymoy*



Javnaðarflokkurin fer komandi valskeið at virka fyri at umvæla og útbyggja stuentaskúlan í Hoydølum.

"Dalurin Fagri" verður ofta umrøddur sum mentanarháborg tjóð okkara, og hetta ikki uttan orsøk. Sum størsti miðnámsskúlin í landinum hýsir Føroya Studentaskúli & HF-skeið stórum parti av unga ættarliðnum. Í Hoydølum verða tey lærd og ment til at leika sín lut í føroyska samfelagnum.

Tíverri hevur skúlin higartil ikki verið virdur fyri sín stóra leiklut í føroyska samfelagnum. Seinnu árini hevur verið tosað um glæsiligan skúlamiðdepil í Marknagili, men meðan henda verkætlan anir í hugaheimi teirra fáu, standa bygningarnir, ið einaferð hýstu tuberklasjúklingum, at rapa um oyruni hjá komandi lærarum, sjúkrasystrum, løgmonnum og verkafólki okkara - vón Føroya fólks!

Fyri góðum ári síðani fréttist í fjølmiðlunum, at óvist var, hvussu leingi skúlagongd fór at halda fram í Hoydølum, av tí at alneyðugar umvælingar ikki vórðu framdar; hesar vórðu so útsettar, men fyrr í vetur stóð so aftur at lesa í Sosialinum um óvirðiligu umstøðurnar í Hoydølum: Skúlin er ein brandfella. Venjing, ið ikki royndist ov gott, varð hildin fyri nøkrum árum síðani, men enn er einki gjørt við trygdina. Ein kann spyrja seg sjálvan, um hesi kor eru sømulig at veita frøðisdepli Føroya?

Í 1996 var arkitektakapping hildin, um hvussu skúlin í Hoydølum kundi mennast til at verða førur fyri at lúka samtíðarkrøv til útbúgvingarstovnar, men hetta uppskot varð tíverri steðgað, áðrenn tað kom nóg langt. Tó so, uppskotið er til enn, og um farið verður undir umbygging fyrst í næsta mánaða, kann nýggjur skúli standa klárur í Hoydølum í 2006, ein skúli, ið av røttum hevði verið kallaður ein háborg.

Sum fyrrverandi næmingaráðsformaður í Hoydølum kenni eg alt ov væl umstøðurnar á einum stovni, har nærum 600 fólk hava sína dagligu gongd. Larmur gjøgnum vegg, loft og gólv, stovur uttan ventilatión og plásstrot eru nakrir av mongum trupulleikum, ið arbeiðsfólk og næmingar hava at dragast við.

Sum valevni Javnaðarfloksins eru umstøður teirra lesandi eitt av mínum hjartamálum, eitt mál, sum eg tey næstu fýra árini, við tínum stuðli, farið at seta í fremstu røð.

# Tað ger mun at velja sambandið

**Marja Lamhauge**
*Valevni Sambandsfloksins í Eysturoy*



Tí lati eg meg stilla upp tilløgtingsvalið komandi.

Nógv umráði í okkara samfelag eru forsømd tey síðstu árini, og kemur hettar av, at teir polittikarar, ið hava sitið við valdinum hava brúkt meira tíð og pening uppá, sum teir hava ført seg fram við, "at gera Føroyar til ein soverenan stat", men eg spyrji bara, hvat er komið burturúr?

Einki uttan at nógvur peningur er nýttur til at náa einum máli, ið ikki er nátt, meðan nógv týðandi mál sum eldraøkið o.a eru forsømd.

Vilt tú, góði veljari, sikra tær, at øki sum:

- Eldrarøkt,
- Umsorgan fyri sjúkum og brekaðum,
- Barnaansing til øll børn
- Eitt betri skúlaverk

o.s.v. verða sett í hásæti, ja so er at velja Sambandsflokkin, og tað er ikki verri um tú velur eina kvinnu, tí tær brenna fyri tílíkum málum.

# Eg havi ikki flutt meg!

**Karl Olgar Joensen**
*valevni Sambandsfloksins í Norðoyggjum*



Tað er møguliga onkur, sum undrast á, at undirritaði stillar upp á Sambandslistanum til løgtingsvalið, vitandi um, at eg áður havi stuðlað Sjálvstýrisflokkin.

Støðan hjá mær hevur verið tann, at tá tað snýr seg um ríkisfelagsskapin, so havi eg hildið, at ein hóvligur sjálvstýrispolitikkur, ella sum tað eisini verður nevnt – stig fyri stig á sjálvstýrisleið – er rætti vegurin at ganga. Ein slíkur politikkur gevur møguleika at tillaga samfelagið so hvørt sum stig móti størri sjálsvstýri verða tikin, tí har vit valda, har skulu vit eisini gjalda.

Sum øll minnast, so broytti Sjálvstýrisflokkurin fullkomiliga kós fyri 4 árum síðani. Frá at verða ein hóvligur sjálvstýrisflokkur, gjørdist hann, eins og Tjóðveldisflokkurin, ein loysingarflokkur. Tað sama hendi við Fólkaflokkinum.

**Nýskipanaruppskotið.**
Við nýskipanaruppskotinum hevur Sambandsflokkurin broytt sína støðu til ríkisfelagsskapin nakað. Í hesum uppskotinum verða Føroyar roknaðar sum partur av einum ríki, ið er samansett at trimum javnstillaðum londum. Eftir uppskotinum verða hesi felagamál fyri ríkið: Kongshúsið, Grundlógin, Uttanríkismál, Verjumál, Gjaldoyra og Rættarskipanin.

Sambandsflokkurin miðjar eftir størri sjálvstýri í ríkisfelagsskapinum. Hetta skal gerast við skili, soleiðis at vælferðin ikki kemur í vanda, tá stig verða tikin á sjálvstýrisleið.

Sum sagt, so hevur mær altíð dámt best ein hóvligan sjálvstýrispolitik. Á borgarliga vonginum er tað nú bert ein flokkur, sum hevur ein slíkan politikk, tað er Sambandsflokkurin.

Tí er valið lætt..

Tey, ið eru á borgarliga vonginum og ynskja ein hóvligan sjálvstýrispolitik, sum ikki gongur út yvir vælferðina, hava bert ein møguleika.

X við Sambandsflokkin.